## DAGSINS MEINING

# Farvæl og góðan dag

Tað er kanska við einum ávísum sorgblídni, at vit nú mugu ásanna, at tíðin hjá summarítróttini er við at vera runnin fyri í ár. Milllum annað hava súkklingin og frælsi ítrótturin havt sínar seinstu kappingar, ein og allar seinastu fótbóltsdystirnir verða eisini leiktir nú hetta vikuskiftið.

Longu fyri viku síðani merkti hetta eitt farvæl til fótbóltslandsliðið, sum flest allir føroyingar munnu hava tikið til sín. Eitt landslið, sum enn einaferð hevur prógvað, at hóast vit eru fáment, so kunnu vit standa okkum, tá harðast leikar á.

Árið í ár var kanska eitt sindur blandað. Ikki serliga sannførandi avrik í Sveis og í Írlandi høvdu við sær, at fólk einamest mundu sita og rista við høvdinum framman fyri skíggjan, men samstundis bar til at minnast á framúr løturnar, sum liðið í ár hevur givið okkum. Sjálvasta Frakland ók á knøunum, tá teir á Tórsvølli vóru hálvgum hepnir at sleppa avstað við 2-0 sigri, og niðri á Cypros riðu okkara menn stormin av, hóast heilt nógv stóð á seinastu longu løtuna. Takk skulu tit hava, sum gera tað gjørligt hjá okkum at uppliva slíkar løtur við so stórari felagskenslu. Bæði tit, sum standa á vøllinum, og eisini tit, sum við megnar arbeiði uttan fyri grøna grasið gera hesar avbjóðingar møguligar.

Hóast eitt farvæl altíð er keðiligt – eisini tá tað er fyribils – so merkir eitt farvæl hesaferð eisini góðan dag. Vetrarítróttin hevur í blíðu summarlýðkuni alla tíðina verið í bíðistøðu, og langt um leingi er bíðitíðin eisini av.

Fyri góðari viku síðani fór hondbólturin ígongd. Flogbólturin fór á flog seinasta vikuskiftið, og í løtuni telvar landslið okkara á olympisku talvleikunum á Mallorka. Hópur av øðrum ítróttargreinum eru nú eisini um at standa í besta blóma. Fimleikur, borðtennis, dart, svimjing, badminton, borðtennis. Ja, listin tykist óendaligur við øllum tí, sum vit hóast alt kunnu nýta veturin til.

Eisini her á blaðnum vilja vit gera okkara til, at tað eisini um veturin skal vera vert at fylgja við ítróttini. Eisini her hava vit kvinnur og menn, sum vilja geva heilt nógv fyri at røkka málinum, og eisini tey fara at geva okkum ógloymandi løtur. Bæði í høllum kring landið og framman fyri skíggjan. Hvørt málið so verður rokkið, stendur ikki greitt fyrr enn tað aftur várar, so fram til tá mugu vit liva í óvissuni.

Eftir er bert at ynskja ein góðan ítróttarvetur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eldraíbúðir

**Poula Apol**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum*




Nú hevur so dúgliga verið tosað um eldraøkið og eldraíbúðir; men sigast má, at ikki er nógv gjørt við hettar. Tað verða bygd nógv raðhús, men bert tey, sum hava ráð kunnu keypa, tí tað eru ávísir íbúðarhávar sum sleppa at leggja hvønn grønan blett undir seg og síðan byggja og selja fyri yvir eina mill. Hvar blivu eldraíbúðirnar av?

Tað eru fleiri eldri fólk sum í dag sita í stórum húsum einsamøll, og kundu hugsa sær at selt tey, um tey kundu keypt eina íbúð ístaðin; sum so ein familja á 4-5 fólk kundu keypt hesi hús. Men hesar íbúðir sum nú verða bygdar eru so dýrar, at tær kostar yvir eina mill. og tá er ikki alt innrætta, og skal alt innrættast kosta tær nærri tveimum mill. Hettar kann eingin klára uttan at seta seg í stóra skuld og tað fer neyvan nakar at gera á ellisárum. Nei, her hevur býráðið so sanniliga nakað at hugsa um, og ikki bert parkeringsøkir.

Eisini kundi verið ynskiligt at fingið eitt gott, hugnaligt ellisheim, líka hugnaligt sum tað vit hava í Havn í dag, men sum tíverri er alt ov lítið; men heimligt og ikki so moderna, so tey gomlu kunnu føla seg heima.

# Einki MVG skal leggjast á

**Bjarti Mohr**
*býráðslimur, Fólkaflokkurin*




Ein arbeiðsbólkur undir Landsstýrinum er komin fram til at nú skal mvg leggjast á í samband við húsabygging. Hetta er ein skeiv niðurstøða at koma til og kemur eitt mvg gjald at fáa sera ringar avleiðingar fyri nógv fólk. Alivinnan er stórt sæð farin og við methøgum oljuprísum, minni fiskiveiðu og lágum fiskaprísum er longu steðgur komin í føroyska búskapin. Nógvar familjur merkja hesa afturgongd og eru tað serliga familjur sum ikki hava almenna løn at liva av. Eitt mvg avgjaldið á húsabygging kemur at skunda undir afturgongdina í búskapinum. Hetta rakar fyrst og fremst tær ungu familjurnar sum skulu seta búgv og tær familjuranr sum longu eru raktar av fallandi inntøkum í vinnulívinum.

Heldur enn at darva búskapinum við enn fleiri avgjøldum eiga bæði kommunur og landsstýri at stimbra búskapin við at seta arbeiðir í gongd og lække skattin hjá borgaranum. Avgjøld hava ongantíð og koma ongantíð at skapa nakran framburð.

# Skulu kalla ein spaka ein spaka

**Heini Magnussen**
*Valevni Fólkafloksins*




Tórshavn, sum tann størsta og sterkasta kommuna í landinum, hevur ment seg ómetaliga nógv, hetta farna valskeiði.

Eitt nú, eru samanleggingar framdar, tørvurin á barnaansing er nøktaður, eldrabýli eru bygd og mangt annað.

Men umráðandi er, at býráðið nú fer undir at stykkja fleiri grundstykkir út, byggja næmingaheim, og fáa tørvin á íbúðum nøktaðan.

Eisini er tørvur á býlingshúsum til tey eldru í kommununi, og hetta má kommunan sjálvandi eisini taka í fullum álvara.

Nú er tíðin komin, at býráðið bindur um heilan fingur, og kallar ein spaka fyri ein spaka, og fer til verka við tí fyri eygað at fáa hendan tørvin nøktaðan. í verðandi støðu, er eftirspurningurin eftir bústaði nógv størri enn útboðið, og tað er ikki nóg gott.

Vit fara til arbeiðis, við góðum treysti, og fáa tørvin nøktaðan, so at ein og hvør sum vil, skal kunna seta føtur undir egið borð.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Framførsluhøli til tónleikarar

**Halla Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum*




Vit hava nógvar góðar tónleikarar í landinum, nógv av teimum skriva sín egna tónleik og er hetta sera mennandi og positivt. Men ikki er so lætt hjá teimum at framføra henda tónleik fyri okkum, tí vit hava ikki eitt slíkt stað til hetta endamál.

Vit hava fleiri tónleikarar ið eru blivin kendir, eisini uttanfyri landoddarnar, og eg ivist ikki í, at vit kundu haft fleiri, um bara umstøðurnar hjá teimum vóru betri.

Haldi meg minnast, at tá Perlan, ið var eitt stað, har tónleikarar kundu framføra tónleik, bleiv rivin niður fyri uml. 20-25 árum síðan, skuldi eitt nýtt stað finnast í staðin fyri hana. Tað er so einki komið enn, og vit hava nógv fleiri tónleikarar nú enn tá.

Tí eigur/má Tórshavnar kommuna, stuðla tónleikarunum og útvega teimum eitt høli til framførslur.

Javnaðarflokkurin er greiður yvir støðuna, og vit ynskja at gera umstøðurnar hjá tónleikarunum betri, nevnliga við at útvega teimum eitt høli til hetta endamál.

Fái eg tín stuðul til býráðsvalið 9. nov., so ert tú við til at gera umstøðurnar hjá tónleikaranum betri. So skal eg gera mítt til at hetta mál verður loyst skjótt og væl.

# Uppstillaður til býraðið

**Rasmus A. Joensen**
*Valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar býráð*




Í sambandi við kommunuvalini, ið nú eru fyri hondum, fari eg, sum ein teirra, ið eri uppstillaður á Sambandslistanum í Havnini, at siga nakað um býráðsarbeiðið, soleiðis sum eg síggi tað.

Arbeiðið kann eftir míni meting, býtast upp í fleiri partar. Tríggir teirra eru

- Støðan sum hon er í dag, útgangsstøðan
- Ætlanir fyri farmtíðina
- Vanligi gerandisdagurin

Tað er sjálvsagt, at allur politikkur tekur støði í støðuni, sum hon er í dag, og haðani frá verður so sett út í kortið - ætlanir lagdar fyri framtíðina.

Summar av hesum ætlanum eru fyri styttri tíðarskeið og aðrar fevna um longri tíðarskeið.

Tær stuttu eru ein vegastubbi, ein rundkoyring, fíggjarætlanin fyri næsta árið og líknandi. Tær longru eru byggiætlanir við øllum tí, tær hava við sær og langtíðarfíggjarætlan.

Vanligi gerandisdagurin er allir teir fyrispurningar og uppskot, ið dagliga koma til býráðið og sum verða lagdir fyri umsiting og nevndir, at taka støðu til. Bygging av hjalli, kvist á húsini, blihús v.m.

Í gerandisdegnum er eisini sera umráðandi, at skipa soleiðis fyri, at tey mongu fólkini, ið arbeiða hjá kommununi, trívast og hava eitt gott arbeiðspláss.

Onnur mál eru uppskot frá borgarunum um tiltøk, sum teir eru áhugaðir fyri, og sum teir meta fara at skapa størri trivna í býnum. Eg hugsi um mentanartiltøk og ítróttartiltøk av ymsum slagi.

Uppgávurnar hjá býráðnum eru mangar, og eri eg millum teirra, ið bjóða seg fram til at loysa tær.

# Plastblómur nýtast framvegis ikki vatn

**Poul Michelsen**



Las eina valgrein, sum eitt av valevnunum hjá Tjóðveldislistanum í Havn hevði skrivað. Marianna Heinesen skrivar nakað soleiðis, at eg miðskeiðis í 80-unum hevði skírt ungdómin í Havn nyttuleysan, og at tað tí var *»sum at geva plastblómun vatn«* at stuðla og menna ungdómin í Havn.

At Marianna minnist hesi orð míni er bara gott - men at hon útleggur orð míni soleiðis, at eg við hesum skírdi ungdómin í Havn nyttuleysan og forkelaðan, er púra misskilt.

Orð míni vóru júst søgd í stórari virðing fyri teimum ungu og tí ungdómsarbeiði, sum var og er í Havn.

Havnin hevur altíð havt eitt fyrimyndarliga gott ungdómsarbeið. Eitt ungdómsarbeiði, sum verður fyriskipað av teimum ymisku frítíðarfelagsskapunum við kommunalan stuðli.

Ein lítil bólkur av ungum fólki, sum m. a. Marianna, eftir øllum at døma var ein partur av, hevði ongan hug at virka eftir hesum treytum. Vit krevja av býráðnum, at tað skal gera so og so fyri okkum. Okay, hetta var so teirra máti at síggja tingini uppá og kanska ikki ungdómi ólíkt, men eina ella aðrastaðni skuldi býráðið so seta eitt mark fyri, hvussu stóran part av ábyrgdini býráðið átti at taka fyri at nøkta frítíðartørvin hjá tí einstaka. Onkustaðni skal eginlutur einstaklinga (bólkum) koma til sjóndar.

Og hetta var júst tað, sum manglaði í hesum føri. Tí varð mett, at hetta ikki var mátin at loysa frítíðartørvin í Havn uppá, og eg vóni heldur ikki, at býráðið nakrantíð ferð at loysa ungdómsarbeiði upp á henda mátan. Tekur kravmentaliteturin yvirhond, er tað til óbótaligan skaða - ikki bert fyri tað ungdómsvirksemi, sum longu virkar í besta lagi, men eisini fyri tey, sum fáa síni krøv eftirlíkað.

Tí eri eg glaður fyri, at Marianna í grein síni nú slær fast, at tað er av størsta týdningi, at Havnin hevur ein ábyrgdafullan ungdóm, sum sjálvur er við til at skapa tær rammur og fyritreytir, sum eru fyri tey. Kommunan eigur tá sjálvsagt at hjálpa til, og tað veit Marianna at kommunan hevur gjørt í nógv ár.

Gott kommunuval!!

## Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**

# Ferð á frælsa ítróttin

**Birgir Sondum**
*valevni á Lista E*




Sjálvt um umstøðurnar hjá Bragdinum – felagnum fyri frælsan ítrótt í Føroyum – eru út av lagi vánaligar, halda framvegis nakrar eldsálir lív í felagnum. Og nú ein dagin lýsti felagið eftir børnum at íðka hesa ítróttagrein. Tað var gleðiligt at hoyra.

Eitt av mínum hjartamálum er nevniliga frælsi ítrótturin, og gongst sum ætlað, tekur frælsi ítrótturin dik á seg. Eg ætli mær at arbeiða fyri, at ein vøllur við rennibreyt kemur í høvuðsstaðnum og helst við ítróttarøkið í Gundadali.

Nú eru eisini góð fimtan ár síðani, at Oyggjaleikirnir vóru í Føroyum. Tíðin er komin, at leikirnir aftur verða hildnir her heima, og tí krevst eitt stadion við rennibreyt.

# Vit raðfesta allar borgarar eins

**Kristin Michelsen**
*Borgarstjóri Tvøroyri*




Viðmerkingar til grein hjá Jón Guttesen, Tvøroyri, við yvirskriftini " Tíðin er komin at røkja smábygdirnar ".

Fyrst vil eg takka fyri, at tú við húski ert fluttur til Tvøroyri ella rættari Suðuroy. Sum borgarstjóri vil eg geva tær rætt í, at øll sóknin skal raðfestast eins, men vil ikki geva tær rætt í nógvum av tí, tú førir fram í grein tíni.

Tað er rætt, at borgarnir í allari sóknini eru felags um byrðarnar, men eg kann upplýsa tær Jón Guttesen, at sitandi býráð hevur raðfest borgarnir, ið tú nevnur »smábygdir«, eins og aðrar borgarar í sóknini.

Tú kemur inn á ávís mál, harímillum skúlabarnaflutning. Eg kann upplýsa tær Jón Guttesen, at fyri einum ári síðan gjørdi Tvøroyrar Býráð avtalu við eitt felag um skúlabarnaflutning, við tað at ónøgd var frá fleiri avvarðandi pørtum um skúlabarnaflutningin í sóknini. Hettar royndarár eru nú farið afturum, og býráðsins vitandi eru allir partar sera væl nøgdir við hesari loysnina við skúlabarnaflutninginum. So her ert tú ikki væl inni í málinum, men tú hevur jú búð her í so stutta tíð, so eg beri yvir við tær.

Somuleiðis kemur tú inn á vatnveiting, vegagerð gøtuljós og meir. Viðvíkjandi vatnveiting kann eg upplýsa tær, at tað verður arbeitt miðvíst við hesi ætlan, og er tað ikki lítið av peningi, ið sitandi býráð hevur brúkt til hettar málið, somuleiðis til gøtuljós, og asfalteringar.

Nei Jón Guttesen, Tvøroyrar býráð ætlar als ikki at venda smábygdunum bakið, sum tú skrivar, men sum áður sagt raðfestir allar borgarnar í sókni eins.